## Storari til Sampdoria

Sampdoria hevur leigað málverjan, Marco Storari, frá AC Milan restina av hesum kappingarárinum. Orsøkin til tað er, at fasti málverjin hjá Sampdoria, Luca Castellazzi, er úti við skaða í longri tíð. Longu frammanundan hevur Sampdoria lænt Mario Cassano frá Reggina til málmansplássið, men væntandi verður Storari fyrsta val til málið, til Castelazzi er klárur aftur. Sostatt fær Storari væntandi munandi meira spælitíð enn í skugganum av Dida í Milano.



## Guti vil úr Real Madrid

Ov langt er millum minuttirnar á vøllinum fyri Real Madrid, og tí ynskir Guti at sleppa til okkurt annað felag at royna seg, eftir at hann hevur verið á fyrstaliðnum í »kongafelagnum« síðani 1995. Higartil hevur hann verið settur í samband við ensku Tottenham og Bolton, men mest sannlíkt er, at hann heldur vil sleppa til italska Inter, har hann millum annað kann koma at spæla saman við monnum sum Samuel Eto'o og Wesley Sneijder, ið hann kennir frammanundan.

# Fongur at fáa til Føroya

**– Umframt tiltakið hóskvøldið, tá úrvalsítróttarfólk okkara kunnu hoyra um royndirnar hjá einum, ið hevur verið uppi á tindinum, ætla vit eisini at hava onkrar samlingar fyri okkara bestu ítróttarfólk, sigur forsetin í Ítróttarsambandinum**




Hilmar Jan Hansen

At tað er eydnast at fáa ein so mætan ítróttarmann til Føroya, sum Poul-Erik Høyer, fegnast tey í Ítróttarsambandinum um, tí við sínum drúgvu royndum kann hann siga okkara úrvalsítróttarfólkum nógv um, hvussu tað er at koma upp á tindin og halda seg har, men eisini um, hvussu tað er at koma niðuraftur.

– Tað er Badmintonsambandið, sum hevur fingið sambandið við hann í lag, og tá hann hevði áhuga fyri at koma til Føroya, tóku vit av, tí hetta er fongur at fáa til Føroya. Samstundis er hetta ein náttúrligur liður í okkara arbeiði við úrvalsítrótti, sigur Sølvi R. Hansen, ÍSF-forseti.

– Hetta er nakað av tí, vit hava tosað um, at vit skuldu royna at fáa eina persónligheit hendavegin, ið veruliga kann læra okkara ítróttarfólk nakað. At tað so júst gjørdist ein, ið hevur roynt seg í einari ítróttargrein, sum kanska ikki er so merkt av nógvum pengum, sum fleiri aðrar eru tað, fær júst hesa vitjanina at hóska væl til okkara tørv á økinum.

### Meira er á veg

Tiltakið, sum verður í Skálanum í Norðurlandahúsinum hóskvøldið, er bert eitt av fleiri, ið ætlanin er at fáa í lag, so føroysku úrvalsítróttarfólkini kunnu fáa bæði hjálp og íblástur til at fylgja teimum málum, tey hava sett sær.

– Eitt annað, vit eisini hava havt í umbúna, er at hava onkrar samlingar fyri okkara úrvalsítróttarfólk, so tey – tvørtur um tær ymsu ítróttargreinarnar – kunnu koma saman at deila sínar royndir við hvønnannan. Men eisini kundi ein sovorðin samling verið skipað við einum seminari ella onkrum líknandi, heldur Sølvi R. Hansen.

– Við tí játtan, vit hava fingið frá tí almenna til at menna úrvalsítróttin, hava vit miðvíst valt at satsað nógv upp á Pál Joensen, so vit kunnu vera við til at hjálpa honum at gera so góður, sum tað ber til. Størsti parturin av játtanini fer til tað, men vit hava framvegis møguleikar at gera onnur ting, ið eisini kunnu koma hinum úrvalsítróttarfólkunum til góðar, og tiltakið hóskvøldið er so eitt stig á tí leiðini.



Sjálvur annar verður danski badmintonspælarin, Poul-Erik Høyer, hóskvøldið at hoyra í Skálanum í Norðurlandahúsinum hóskvøldið, har úrvalsítrótt verður í miðdeplinum

Mynd: Jens Dresling/Polfoto

# Badmintonstjørna til Føroya

**Í vikuni fær Ítróttarsambandið vitjan av danska badmintonspælaranum, Poul-Erik Høyer, sum fyrra helming av 90-unum vann hópin av altjóða kappingum. Saman við einum øðrum frá danska badmintonsambandinum skal hann kunna um úrvalsítrótt**




Hilmar Jan Hansen

Alsamt meira fokus verður sett á úrvalsítrótt í Føroyum, og hóskvøldið klokkan 19 hevur Ítróttarsambandið eitt serligt kvøld í Skálanum í Norðurlandahúsinum fyri miðvís ítróttarfólk, venjarar teirra og annars øll áhugað, har tveir danskir gestir við breiðari vitan um úrvalsítrótt fara at greiða frá. Hetta tiltak er liður í úrvalsarbeiðinum hjá Ítróttarsambandinum.

Annar teirra er danski badmintonspælarin, Poul-Erik Høyer, sum telist millum mætastu ítróttarfólk í Danmark gjøgnum tíðirnar og fyri kortum gjørdist 25. limurin í donsku Hall of Fame. Eitt nú vann hann OL-gull í 1996, All England í 1995 og 1996 og EM-gull í 1992, 1994 og 1996. Hin er Finn Trærup-Hansen, ítróttarstjóri í úrvalsdeildini hjá danska badmintonsambandinum, har Poul-Erik Høyer nú er næstformaður.

Hóskvøldið fer hoyra Poul-Erik Høyer at siga frá sínum egnu royndum sum úrvalsítróttarfólk, bæði á ungum árum og sum vaksin, eins og ímóti endanum á yrkisleiðini. Hann kemur eitt nú inná, hvussu vit savna okkum og arbeiða miðvíst við okkara ítróttarlívi, og eisini hevur hann síni boð uppá, hvussu vit gerast meistarar.

Finn Trærup-Hansen fer at siga frá, hvussu tey í úrvalsdeildini hjá danska badmintonsambandinum skipa sítt úrvalsarbeiði, hvussu ítróttarfólk verða vald út og hvussu tey verða stuðlað. Eisini greiðir hann frá, hvussu virksemið hjá úrvalsítróttarfólkunum verður lagt til rættis og hvønn leiklut badmintonsambandið annars hevur í lívinum hjá hesum ítróttarfólkum.